VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Gul til stívt andøvsgul av norði og landnyrðingi og ælingur, partvís kavi, men eisini sólglottar. Hitin millum frostmarkið og +3 stig.



Veðrið hósdagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av norði og kavaælingur, seinnapartin minni vindur av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitalagið um frostmarkið.



Veðrið fríggjadagin:
Gul til stívt andøvsgul av vestri, seinnapartin upp í ein strúk av útsynningi. Yvirhøvur turt og sólglottar, men um kvøldið vátakavi, seinni regn. Hitin millum 3 og 6 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Leygardagin upp í hvassan vind av vestri og útnyrðingin og ælingur, sum frálíður kavi. Sunnudagin hvassur vindur av norði og kavaælingur. Hitalagið millum 2 kuldastig og 2 hitastig.

Ánir skifta navn

Í farnu varð eitt tilmæli lagt fram um, hvussu 13 føroysk bygdanøvn eftir ætlan skulu verða í framtíðini.

Í ávísum førum verður talan um rættiliga stórar broytingar, millum annað skuldi Øravík nú stavast Ørðavík og Akrar stavast Agrar.

Gongst sum ætla mugu helst eisini norðoyingar læra seg at skriva bygdarnavnið Ánir rætt.

Tey hava altíð sagt tað, men nú skal tað eftir øllum at døma bæði sigast og skrivast rætt.

Upprunaliga hevur staðið óivað itið "Í Ánunum" sigur nevndin sum hevur gjørt hetta tilmælið um føroysk bygdanøvn.

Síðani er navnið drigið saman til Ánum ella Ánunum. Av hesum er tann sekunderi hvørfalsformurin Ánirnar sprottin, og hann hevur eisini verið tann vanligi talumálsformurin.

Tí mugu bæði skelti og Føroyakortið gerast av nýggjum.

sb.

Stóra og nógv brúkta góðshavnin hjá Klaksvíkar kommunu liggur í Ánum – men hetta verður nú broytt til góðshavnin í Ánunum, soleiðis sum fólk altíð hava sagt

Mynd: Høgni Thomsen

Skeltini í Norðoyggjum mugu helst skrivast av nýggjum

Mynd: Høgni Thomsen

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	1
Nuuk	3
Qaqortoq	8
Ammassalik	0
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	-1
Seyðisfjørður	0
Tórshavn	4
Lerwick	7
Aberdeen	6
London	6
Tromsø	--
Bergen	8
Oslo	--
Stokkhólm	6
Keypmannah.	7
Helsinki	3
Moskva	-9
Berlin	5
Warzawa	0
Kiev	-5
Bukarest	0
Paris	0
Madrid	8
Róm	10
Malorca	16
Athen	14
Malta	15
Tunis	14
Beijing	9
New Dehli	25
Bangkok	28
Jakarta	31
Sydney	--
New York	5
Miami	25
Los Angeles	14
Meksikobýur	--
Panama	--
La Paz	9
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	26

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt hátrýst, 1022 hPa. yvir Suður~Noreg fer eystureftir og ein hátrýstryggur yvir Føroyum viknar.



Í dag:
Lágtrýstið við Skotland fer spakuliga í landnyrðing. Ein kuldabrúgv við Føroyar fer í landsynning

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 18/11 kl. 06⁰⁰ – 19/11. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 4,5°
Minsti hiti máldur í november: -7,2° - Mesti hiti máldur í november: 12,2°

AVFALLIÐ



Avfallið: 3,0 mm – mált frá 18/11 kl. 06⁰⁰ – 19/11. 06⁰⁰
Avfallið higartil í november: 63 mm

Tiltøk í Miðlahúsinum

22. november
7b í Hoyvík á hundasleðu í Grønlandi

26. november kl. 19
Kvinnuhúsið

28. november
Landsbankin

FØROYABANKI
stuðlar tiltøkum í Miðlahúsinum

VESTFALLSKYRRINDI

17. november Fyrra kvarter
24. november Mánin næstur jørðini

Kelda: Almanakkin 2007

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
20. Nov.	02.27	14.48	01.27	13.48	01.42	14.03	04.27	16.48	05.27	17.48	00.42	13.03	-	12.03	02.42	15.03	03.42	16.03	02.12	14.33	03.27	15.48
21. Nov.	03.09	15.31	02.09	14.31	02.24	14.46	05.09	17.31	06.09	18.31	01.24	13.46	00.24	12.46	03.24	15.46	04.24	16.46	02.54	15.16	04.09	16.31
22. Nov.	03.54	16.18	02.54	15.18	03.09	15.33	05.54	18.18	06.54	19.18	02.09	14.33	01.09	13.33	04.09	16.33	05.09	17.33	03.39	16.03	04.54	17.18
23. Nov.	04.43	17.10	03.43	16.10	03.58	16.25	06.43	19.10	07.43	20.10	02.58	15.25	01.58	14.25	04.58	17.25	05.58	18.25	04.28	16.55	05.43	18.10
24. Nov.	05.37	18.05	04.37	17.05	04.52	17.20	07.37	20.05	08.37	21.05	03.52	16.20	02.52	15.20	05.52	18.20	06.52	19.20	05.22	17.50	06.37	19.05

Lesið Sosialin -tað loysir seg